# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR









*Reykjavík er sera nógv vaksin seinnu árini*

# Nýmótans býur bíðar

**Um ikki ein rættiligur stórbýur, so hevur Reykjavík tey flestu serkennini, sum ein slíkur býur hevur. Og høvuðsstaður Íslands er uttan iva meiri nýmótans enn nógvir aðrir stórbýir**

Hóast niðurgongd í íslendska búskapinum seinastu mánaðirnar, so merkist hetta ikki í býarmyndini á Reykavíkarleiðini. Allastaðni daga stórir byggikranar móti himli, og býurin sær framvegis út til at hava voksiverk, sum hann hevur havt tey seinnu mongu árini. Nú er tað sjálvandi soleiðis, at bremsilongdin á byggivirksemi hevur eina ávísa longd, so ein viknaður búskapur sæst ikki beinanvegin aftur á býarmyndini.

Millum annað nógvir føroyingar arbeiða í íslendsku byggivinnuni og teir siga, at enn er sera nógv at gera.

Íslendingar hava altíð borið orð fyri at vera eitt sera framsøkið og nýmótans fólkaslag. Hetta kemur ikki av ongum. Miðdepilin hjá íslendingum, Reykjavík, er á øllum økjum ein sera framkomin høvuðsstaður. Nærmast allastaðni í býnum sæst, at einans tað besta er gott nokk fyri íslendingar og tey ferðafólk, ið vitja býin. Tað verði seg arkitekturur, sniðgeving, handilsvirksemi, frítíðarvirksemi, undirhald og ikki at gloyma teir nógvu baðifasilitetirnar, ið eitt serkenni fyri íslendska høvuðsstaðin. Tað finnast ikki minni enn 15 svimjihallir ymsastaðni í býnum.

Gott nokk hevur Ísland nakrar náttúrugivnar resursir við tí heita vatninum, sum vit í Føroyum ikki hava, men grannarnir fyri norðan hava sanniliga dugað væl at gagnnýtt hesar til fulnar. Teir sokallaðu »heitipottarnir« finnast næstan allastaðni, har sum ferðafólk koma. Millum annað hava allar svimjihallirnar heitipottar, hvørs vatn kemur frá landsins æviga orkuverki, sum er tann heita undirgrundin. Her verður baðað, tosað saman, og her er gott pláss fyri fremmandum.

### Áhugaverd støð

Sjálvt um Reykjavík ikki er av bíligastu býum at ferðast í, so er høvuðsstaðurin og Ísland sum heild ikki dýrari enn so nógva aðrastaðni á okkara leiðum.

Reykjavík er kendur sum mentunnarbýur, sum hýsir nógvum góðum tónleikarum, sniðgevum og øðrum listafólki. Einaferð um árið verður skipað fyri altjóða rytmiskari festival og eini stórari mentunnarfestival. Her finst eisini ein ørgrinna av museum og gallaríum, ið hava tað nýggjasta nýggja at bjóða.

Í mun til føroyingar framleiða íslendingar lutfalsliga nógv sjálvir, og tí eru shoppingmøguleikarnir eisini góðir. Ikki bert matvørur framleiða teir sjálvir, men nógv innanfyri bæði snið, klæði og aðrar handilsvørur.

Burtursæð frá tí gamla íslendska torvhúsinum, ið stavar frá víkingatíðini, so er íslendsk byggilist rættiliga ung. Helst tí, at vælstandurin – eins og í Føroyum – er rættiliga ungur. Nú er smakur ymiskur, men tað finnast eftirhondini ein ørgrynna av áhugaverdum bygningin. Millum annað tann stórsligna Hallgrímskirkjan, ið varð vígd í 1986, men sum tað tók á leið 40 ár at fáa liðugt bygda. Útsýnið úr torninum er tað besta í øllum býnum.

Eitt annað er Perlan, sum er bygd á Øskuhlið oman á seks stórar vatnbrunnar, ið er tann elsta veitingin av heitum vatni í Reykjavík. Onnur áhugaverd støð at vitja eru til dømis Norðurlandahúsið, sum kendi finski arkitekturin, Alvar Aalto hevur teknað, Altingið, Listasavfn Reykjavikur, Safn og Kjarvallsstaðir.

Fleiri av hesum og øðrum vitjunarmøguleikum fara vit at gera meiri burtur úr teir komandi dagarnar.

## Puntur nr. 1






sansir.fo

## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari